# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– McCain sigur seg styðja amerikanskan bilídnað, men sjálvur koyrir hann Honda, Toyota og Volkswagen*
*(talsmaður hjá Obama)*

# Finnland hjálpti Nazitýsklandi við jødatýningini

**Ein nýggj ritgerð avdúkar, at tað almenna Finnland samstarvaði við Nazitýskland undir seinna heimsbardaga um at týna jødarnar**

Finska søgan má skrivast av nýggjum. Tí sambært einari ritgerð, sum søgufrøðingurin Oula Silvennoinen hevur skrivað, medvirkaði tað almenna Finnland til jødatýningina hjá Nazitýsklandi í árunum frá 1941 til 1944.

Í ritgerðini, sum verður løgd fram á lærda háskúlanum í Helsinki um vikuskiftið, stendur, at Finnland og Týskland skipaðu eina loyniliga tænastu, sum virkaði undir heitinum "Einsatskommando Finnland", og hvørs uppgáva var at beina fyri jødum og kommunistum.

Tað er ikki greitt, hvussu mongum jødum mog kommunistum tann loyniliga tænastan beindi fyri.

- Men vit vita, at Finnland samstarvaði við Týskland um tann sokallaða "jødiska spurningin", sigur Oula Silvennoinen við Aftenposten.

Nýggj gransking hevur eisini avdúkað, at finnlendingar fóru illa við sínum krígsfangum. Av teimum 64.000 russunum, sum vóru í finskum fangalegum undir seinna heim.



*Tá tann kendi finski generalurin Mannerheim fylti 75 tann 4. juni í 1942, var Adolf Hitler ein av føðingardagsgestunum, sum myndin vísir. Tað er Mannerheim, sum stendur uppi. (Mynd: Finska verjan)*

# Putin og Medvedev vilja hava betri samband við Vesturheimin

**Tað ljóðar, at russiska leiðslan er til reiðar at offra Sergej Lavrov, uttanríkisráðharra fyri at bøta um viðurskiftini við Vesturheimin**

Russiski uttanríkisráðharrin, Sergej Lavrov, er ein virdur diplomatur og verður av mongum mettur sum tann fremsti russiski diplomaturin. Men sambært blaðnum Nezavisimaja Gazeta, sum hevur gott samband við ta ovastu russisku leiðsluna, eru Dmitrij Medvedev, forseti, og Vladimir Putin, forsætisráðharri, til reiðar at ofra Lavrov í einari roynd at bøta um viðurskiftini við Vesturheimin.

Síðani Georgia-kreppuna hevur Sergej Lavrov verið ímyndin av teimum vánaligu viðurskiftunum millum Russland og Vesturheimin. Men Medvedev sigst vera sinnaður at toyggja seg langt fyri at sleppa undan fleiri ósemjum, og sambært Nezavisimajua Gazeta kann ein avleiðing verða, at uttanríkisráðharrin verður skiftur út.

Sergej Lavrov er høgt í metum í russisku leiðsluni og millum tað vanliga russiska fólkið, ið metir hann sum ein, ið altíð tosar Russlands søk. Tí rør russiska blaðið uppundir, at Lavrov kanska verður varaforsætisráðharri, tí á tann hátt varðveita russar sambandið við hann, meðan hann hvørvur av tí uttanríkispolitiska pallinum.

Politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at hóast Medvedev og Putin vilja hava betri viðurskifti við Vesturheimin, so merkir tað neyvan, at Russland fer at broyta støðu í spurninginum um Suðurossetia og Abkhasia, sum Russland hevur viðurkent sum sjálvstøðug lond.



*Sergej Lavrov, uttanríkisráðharri, verður kanska skiftur út (Mynd: Polfoto)*




*Superluksus og gigantfly trekker passasjerer. Det kan det australske flyselskapet Qantas bekrefte etter at selkapet i helgen mottok sitt første eksemplar av det som nå er verdens største passasjerfly - franske Airbus A380. - Bookingtallene for dette nye flyet har vært oppsiktsvekkende gode, sa administrerende director i Qantas, Geoff Dixon, i forbindelse med overtakelsen av selskapets nye stolthet.Rett i hangar Søndag landet flyet for aller første gang på Sydney Airport. Etter en kort seremoni ble superjuboen kjørt rett i hangaren. Der blir den stående for oppgradering frem til 20. oktober. Da flyet skal ut på sin første kommersielle rundtur mellom Melbourne og Los Angeles.*

*Qantas er det tredje selskapet som får Airbus-kjempen etter Singapore Airlines og Emirates. Og i likhet med de to andre selskapene, vil heller ikke Qantas utnytte passasjerkapasiteten fullt ut. Leverandøren Airbus har sagt at flyet greit skal kunne ta opp mot 800 passasjerer med kun økonomiklasse om bord og rundt 600 med flere klasser. I den versjonen det australske selskapet sender ut på markedet, er kapasiteten imidlertid skrudd ned til rundt 450 seter.*
*Luksus*

## STUTT SAGT

### Stonehenge var læknastøð

Bretskir fornfrøðingar siga seg nú vera komnar til ta niðurstøðu, at tann kendi klettaringurin Stonehenge er frá umleið ár 2300 fyri kristi føðing ella umleið 300 ár yngri, enn fornfrøðin hevur hildið higartil. Harafturat halda teir seg vita við vissu, at klettarnir eru fluttir í Presili í Wales, sum er umleið 240 kilometrar burturi.

Eisini eru fornfrøðingarnir komnir eftir, at Stonehenge helst hevur verið eitt slag av einari læknastøð og kann kanska samanberast við Lourdes í Fraklandi. Millum annað hevur tað víst seg, at nógv av teimum, sum eru jarðað við Stonehange, eru deyð av ymsum álvarssomum sjúkum. Kanningarnar benda á, at umleið helmingurin av teimum, sum eru jarðað har, vóru ættað av Stonehenge-leiðini, meðan hini helst eru komin langvegis at leita sær læknahjálp.

Hetta er fyrstu ferð í 44 ár, at fornfrøðingar hava fingið loyvi til at grava í Stonehenge. Tær flestu kanningarnar eru síðani gjørdar í kanningarstovnum á lærda háskúlanum í Oxford.

### Funnið gamlan bústað

Amerikanskir fornfrøðingar hava funnið leivdir av einum mannabústaði í bygdini Paisiley í statinum Oregon, og vísa fyribilskanningar, at fólk hava búleikast har fyri 14.300 árum síðani.

Fornfrøðingarnir hava vanlia tøkni og DNA-kanningar til at finna aldurin á bústaðnum, og er niðurstøðan røtt, er hetta elsti mannabústaður, sum er funnin í USA higartil, skrivar AP. Tann elsta búsetingin, sum er funnin fyrr, verður hildin at vera umleið 13.500 ára gomul.

Búsetingin, sum er funnin í Oregon, er í einum helli, og vísindafólk halda, at eitt stórt vatn hevur veriðstutt frá hellinum.